# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Soleiðis fyrigevur Jesus. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Leivur Steintún talar. Heimasíða: www.hebron.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 26. apríl kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20 talar Ian Burness har evnið verður »Trúgv á Gud í okkara tíð« Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har Ian Burness frá Echoes of Service talar, kl. 21 Útimøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti við Durutu og Ejvind Mouritsen har sunnudagsskúlabørn spæla leik og syngja. Drekka verður aftaná.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Toril og Niels Edvard Olsen, kl. 17 Familjutími við drekkamunni.
Títtlingasangarar skipa fyri. Øll eru vælkomin. (Eingin sunnudagsskúli).

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti. Leygardagin kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomufundur. Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
Sunnumorgin í Hoyvíkar skúla verður familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjunarmøti kl. 12, til bæði møtini talar Ian Burness. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum. Bøn og bíbliutími har Zacharias Zachariasen talar um Nehemia. Heimasíðan: www.livdin.fo

**Ísraelsfelagið**
skipar fyri almennum fundi í høllini á Hotel Hafnia sunnudagin kl. 14.30, har Símun Absalonsen fer at halda fyrilestur um evnið: »Ísrael og vit«.

**Aglow, Norðstreymoy**
Møti verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Helga Henriksen. Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Telefonandaktin 424741

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen og kl. 17 við Kára Jacobsen. Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Keldan í Skálafirði**
Leygardagin kl. 21 Opið hús v/ Arna Abrahamsen. Sunnudagin kl. 17 Møti v/ Paula Høj, kl. 17 Barnamøti. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Missónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan til húsið. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 26. apríl kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**KFUM & K í Klaksvík**
*Ungdómsvikuskiftirmøti:*
Fríggjadagin kl. 20 Møti í Christianskirkjuni við Bergur Debes Joensen Evni: »Fylg mær«, sangur: ASKAM, Drekka aftaná. Kl. 23 Konsert við VOX.
Leygardagin kl. 10 Bíbliutími við Bergur Debes Joensen. Evni: »Fylg mær – hvussu«. Kl. 20 Møti við Hans Kristian Jóhannessen, Gospelkórið »Gleði« luttekur. Drekka aftaná. Kl. 23 Sang og vitniløta.
Sunnudagin: kl. 11 Gudstænasta við altarg., í Christianskirkjuni kl. 11, kl. 14 Familjumøti, kl. 18 Møti við Pól Jóhannessen, barnakórið syngur, kl. 21 Sang og vitniløta. Øll hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini.

**Missiónshúsið í Hovi**
Missiónsvika verður við møtum fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. John S. Myllhamar, trúboðari o.o. tala. Sunnukvøldið er innsavnan.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14. Vegna møti í Hovi verður einki møti sunnukvøldið.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna missiónsviku í Havn.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Ester og Malan. Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Møti verður**
leygardagin 26. feb. kl. 19.30 í Zions Kirkens Sognehus, sum liggur á Nygårdsvej 103 í Esbjerg. Árant Johannsen talar. Bønarmøti byrjar kl. 19.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Týsdagin 22. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Indiskt te. (Filmur um økologiskt landbúrk) Roar Olsen
*Mikudagin 23. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur út í Sandagerð
*Hósdagin 24. apríl*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Máling á toy, Solveig Isfeldt. Tilm. 316491
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 25. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 27. apríl verður kommunumark gingið: Hundsarábotnur-Leynavatn. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Gingið verður uml. 3 tímar. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 27. apríl verður spákingartúrur í Fuglafirði á skránni. Frásøgumaður er Petur Martin Petersen. Møtt verður við Kunningarstovuna í Fuglafirði kl. 14.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**LISA**
Frá 24. februar er skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu opin soleiðis:
mánadag, mikudag, hósdag og fríggjadag frá kl. 9-12, týsdag er opið frá kl. 18.30-20.30.
Limir eru vælkomnir inn á gólvið. Tlf. 320197.
teldupostur: lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilaskaðaráðgeving**
Hevur tú spurningar um heilaskaðar, afturvenjing ella annað, so ber til at skriva til okkara á "NeuroCom, FO 400 Oyrarbakki", at senda teldupost til:
info@neurocom.dk ella at ringja til 225 263.
NeuroCom, Oyrarbakki

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

## KONFIRMATIÓN

27. apríl verður André Mouritsen, sonur Mohrid og Bent Mouritsen konfirmeraður í Gelsted Kirke. Adr. Tårupvej 33, 5591 Gelsted. tlf. 0045 64 49 26 16.

## 80 ÁR

Í gjár 24. apríl varð Jakku Jacobsen, Glyvrar, 80 ár. Dagurin verður hildin heima leygarkvøldið 26. apríl frá kl. 18.00.



## FILMSTEIGURIN

# Storbyens små mirakler



Marisa Ventura er ein hart arbeiðandi, gløgg og málrættað einlig mamma, sum býr í Bronx í New York við sínum tíggju ára gamla soni, Ty. Sjálvt um tey ikki eiga nógvan pening, hevur tað kortini eydnast Marisu at skapa teimum báðum eina hampuliga tilveru. Hon droymir kortini framvegis um eitt betri lív – langt burtur frá harða umhvørvinum í Bronx – og um at bjóða lítla Ty eina betri skúlagongd.

Til dagligt arbeiðir Marisa sum reingerðarfólk í einum av fremstu hotellunum á Manhattan – Beresford Hotel. Og ein púra vanligan leygarmorgun hendir nakað, sum av álvara vendir tilveruna hjá Marisu og Ty upp og niður.

Hendan morgunin er Marisa nevniliga noydd at taka Ty við sær til arbeiðis, og hon biðjur ein av sínum starvsfeløgum um at halda eyga við honum, tá hon og starvsfelagin Stephanie gera reint á komørunum. Á teirra rundu hitta tær eina múgvandi kvinnu, sum biðjur Marisu fara at býta nøkur designara klæði um fyri hana.



Stephanie eggjar Marisu til at royna klæðini, men hetta er Marisa ikki nógv fyri. Hon játtar treyðugt at royna klæðini, hon ongantíð sjálv væntar at fáa ráð til.

Meðan alt hetta hendir, hittir lítli Ty einum av kendastu gestunum á hotellinum – republikanarin Christopher Marshall, sum er uppstillaður til Senatið. Umframt at vera ein kendir politikari, so er Christopher Marshall eisini ein av mest umsvermaðu ógiftu monnunum á Manhattan.

Hann er á veg út at lufta hundin hjá sær, tá hann hittir Ty og spyr, um Ty vil koma við honum. Ty sigur ja, men noyðist fyrst at spyrja mammu sína.

Tá so Ty og Christopher koma til hotelkamarið, har Marisa og Stephanie eru, stendur Marisa ílætin dýra designara klæðini. So Christopher heldur, at hon er ein av múgvandi gestunum á hotellinum. Hann gerst beinanvegin skotin í henni og býður henni við ein túr í Central Park. Marisa skal siga nei, men Stephanie syrgir fyri, at hon fer við.

Marisa og Christopher gerast skjótt forelskaði, men spurningurin er, hvussu leingi tey kunnu halda forholdið loyniligt, og ikki minst, hvussu leingi Marisa kann halda sannleikan fjaldan fyri Christopher…





Frumsýning
Fríggjadagin 25.04. kl. 19$^{00}$ Fríggjadagin 25.04. kl. 23$^{15}$
Leygardagin 26.04. kl. 19$^{00}$ Leygardagin 26.04. kl. 23$^{15}$
Sunnudagin 27.04. kl. 20$^{30}$ Sunnudagin 27.04. kl. 22$^{45}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Fríggjadagin 25.04. kl. 18$^{45}$ Fríggjadagin 25.04. kl. 21$^{15}$
Leygardagin 26.04. kl. 18$^{45}$ Leygardagin 26.04. kl. 21$^{15}$
Sunnudagin 27.04. kl. 18$^{30}$ Sunnudagin 27.04. kl. 21$^{00}$




Fríggjadagin 25.04. kl. 20$^{45}$ Leygardagin 26.04. kl. 20$^{45}$
Sunnudagin 27.04. kl. 23$^{00}$




Fríggjadagin 25.04. kl. 23$^{30}$ Leygardagin 26.04. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 27.04. kl. 19$^{00}$




Fríggjadagin 25.04. kl. 17$^{00}$ Leygardagin 26.04. kl. 17$^{00}$
Sunnudagin 27.04. kl. 16$^{30}$ – *Seinasta sýning*

KOMANDI FILMUR




Heimsfrumsýning Mikudagin 30.04.